# Kunning um upptøkuroynd

Tey, sum vilja lesa Master í løgfrøði frá heysti 2023, skulu møta til upptøkuroynd mikudagin 28. juni 2023, kl 10-16. Royndin verður hildin á veghæddini á Søgu- og samfelagsdeildini, Jónas Broncksgøtu 25.

Upptøkuroyndin telur saman við bachelor prógvi, viðkomandi royndum og eftirútbúgvingum v.m. í metingini av, hvør er skikkaður til upptøku. Umsøkjarar mugu í minsta lagi standa upptøkuroyndina við próvtalinum 7.

## Endamálið við royndini

Fortreytin fyri at lesa Master í løgfrøði er bæði ein ávís vitan um lóg og rætt og løgligar stovnar og ein grundleggjandi fatan av tí søguliga og samfelagsliga høpi, sum lóg og løgfrøði er partur av. Eisini krevjast góðir skrivifØrleikar og førleikar at loysa trupulleikar og grundgeva fyri loysnum.

Endamálið við upptøkuroyndini er tískil at kanna, um umsøkjarar hava nøktandi av grundleggjandi vitan og førleikum og hartil góð evni til at skriva og grundgeva á føroyskum, donskum og enskum.

## Um royndina sjálva

Royndin kemur at standa í fleiri ymiskum pørtum, ið ikki verður kunnað neyvt um frammanundan, men sum kemur at líkjast hesum:

- Uppgávu, ið gevur mynd av grundleggjandi vitan um lóg og rættarskipan.
- Uppgávu, ið gevur mynd av, hvussu væl umsøkjarin dugir at loysa praktiskar trupulleikar og at grundgeva fyri sínum loysnum.
- Uppgávur, ið lýsir evnini hjá umsøkjara at skriva tekstir frá grundini á føroyskum, donskum og enskum og, á øllum hesum málum, argumentera og grundgeva fyri ymiskum loysnum.
- Uppgávur, har umsøkjari verður biðin um at tulka ymisk tekstasløg, so sum brot úr yrkingum, skaldsøgum, klassiskum politiskum bókmentum v.m. Eisini henda uppgáva kann verða sett, ella kravd svarað, á ymiskum málum.

## Praktiskir upplýsingar

Umsøkjarar, sum ætla til upptøkuroynd 28. juni, skulu melda til í seinasta lagi **mikudag 21. juni, kl 12**. Hetta gerst við at senda boð til Lestrarskrivstovuna á LSS@setur.fo við fullum navni og føðingardegi.

Umsøkjarar skulu hava samleikaprógv við og egna farteldu og forleingjara til streym.

Uppgávuspurningarnir verða latnir í pappírsformi og á geyma.

Royndin verður dømd anonymt, har tey, sum rætta uppgávusvarini, ikki kenna samleikan á tí, sum hevur svarað, fyrr enn aftaná, at meting av próvtali er gjørd. Í sambandi við tilmelding fáa umsøkjarar tískil eitt nummar, sum skal skrivast á innlatingina. Nærri verður kunnað um tað í sambandi við tilmeldingina.

Uppgávan skal svarast á tí word-skjalinum, ið liggur á geymanum, ið umsøkjarin fær útleverað til royndina.

Umsøkjarin skal konvertera svarið til pdf áðrenn innlating, so sum frægast slepst undan trupulleikum við ymiskum teldum og telduforritum.

Uppgávusvarini skulu BÆÐI latast inn á nevnda geyma og EISINI sendast á teldupostadressuna LSS@setur.fo

Internet er ikki loyvt, og samskifti við uttanfyristandandi er strangliga bannað og er burturvísingargrund.